EB/Streymur
Stovnað: 23.01.1993
FO-470 Eiði
Tlf. 423185 og 423255
**Formaður:** Olaf Fríðheim

**Meistarar:** Ongantíð: Besta úrslit, nr. 8 í 1. deild í 2001
**Steypavinnarar:** Ongantíð
**Greipuvinnarar:** Ongantíð
**Í 1. Deild (4 ár):** 1994 og 2001-
**Í Europa:** Ongantíð

# Felagsliðið hevur styrkt um sína støðu

**At EB/Streymur er partur av bestu fótbóltsdeildini verður ikki longur mett at vera bara ein parantes millum fleiri aðrar**

JÓANNES HANSEN

Í føroyskum fótbólti hava tað altíð verið nøkur stór feløg og so hini. Feløgini, sum altíð hava verið í fremstu røð, eru KÍ og HB. B36 hevur altíð verið mett at hoyra heima millum størstu feløgini.

Hjá onkrum av hinum feløgunum hevur tað gingið skeiva vegin, og hjá øðrum hevur tað gingið rætta vegin. Serliga í Eysturoy hevur tað gingið rætta vegin hjá fleiri.

Nýggjasta felagið, sum tað av álvara tykist hava gingið rætta vegin hjá, er EB/Streymur. Tá ið EB og Streymur kastaðu saman fyri tíggju árum síðani, var tað so at siga av neyð. Bæði liðini vóru í 2. deild, men tað var sera tepurt við fólki. Í staðin fyri at kríggjast ímóti hvørjum øðrum valdu ábyrgdarfólkini at ganga saman. Í fyrstu atløgu gekk væl, og liðið flutti upp í 1. deild. Men so flutti EB/Streymur niður aftur, og eitt skifti tóktist tað sum um, at eingin nytta ella vinningur hevði verið í samanrenningini.

Tey seinastu árini er ivin um, hvussu rætt tað var at leggja saman, minkaður, og nú munnu tey vera fá, sum høvdu atkvøtt fyri, at feløgini skuldu tikið felagsliðið burturúr kappingini. Í 2000 vann EB/Streymur sannførandi 2. deild, og síðani hevur gingið fótbóltsliga og skipanarliga framá, hóast endaliga úrslitið í fjør ikki var, sum tað leingi varð roknað við.

Flestu spælararnir á besta liðnum eru ættaðir úr Sundalagnum ella av Eiði og har á leið. Saman við hesum monnunum mynda fýra eystureuropearar og tveir aðrir liðið.

Pólverjarnir eru tríggir. Piotr Krakowski er venjari, og Andrzej Pazek og Marek Vierzbicki eru veteranar úti á vøllinum. Piotr og Marek komu í síni tíð til B71, sum teir vóru við til at gera til meistarar. Pazek kom til Klaksvíkar, har hann var við til at gera KÍ til meistara. Nú eru teir allir í EB/Streymi.

Sorin Anghel kom í 2001 úr Rumenia. Hann fall sera væl til og er mest sum vorðin partur av lokalsamfelagnum. Saman við útlendingunum eru Gunnar á Steig úr Klaksvík og Magni á Lakjuni, sum er ættaður úr Fuglafirði, og sum býr í Havnini, og so er talan um í aldri góða blanding av spælarum, ið eru uppvaksnir í EB og Streymi, og sum nú mynda EB/Streym. Lítil ivi man vera um, at felagsliðið eisini komandi árini fer at vera við til at mynda bestu deildina.



*Lítil ivi man vera um, at felagsliðið EB/Streymur eisini komandi árini fer at vera við til at mynda bestu deildina.*

Mynd: Álvur Haraldsen

## Leikarahópur

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Gunnar á Steig | 18/-42 (0-0) | | KÍ |
| Sámal Jóhan Samuelsen | | | |
| **Verja** | | | |
| Hallur Jacobsen | 15/0 (4-0) | | |
| Andrzej Pazek (PÓL) | 16/1 (2-0) | | KÍ |
| Egil á Bø | | | B36 |
| Esmar Eiðisgarð | 7/0 (1-0) | | |
| Eyðfinnur Joensen | 11/2 (0-0) | | |
| Christian Carlsson | 14/0 (3-1) | | |
| Vinjard Dam | 16/2 (3-0) | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Hans Pauli Samuelsen | 18/1 (2-0) | | |
| Marni Djurhuus | 18/1 (0-0) | | |
| Jákup Martin Joensen | 1671 (5-0) | | |
| Marek Vierzbicki (PÓL) | | | B71, FS Vágar, KÍ, VB, ÍF |
| Ronnie Samuelsen | 15/4 (5-0) | | B36 |
| Bárður Olsen | 7/0 (0-0) | | |
| Brian Olsen | | | |
| Teitur Joensen | 16/0 (0-0) | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Magni á Lakjuni | | | ÍF, B36 |
| Ingi Hansen | 3/1 (1-0) | | |
| Jóhan á Stongunum | 2/0 (0-0) | | |
| Sorin Anghel (RUM) | 14/3 (3-0) | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Egil á Bø | 18/5 (1-0) | B36 | |
| Magni á Lakjuni | 18/5 (2-0) | B36 | |
| Marek Vierzbicki (PÓL) | 14/3 (1-0) | VB | |
| **Frágongd** | | | |
| Knút Vesturtún | 11/0 (0-0) | Givin | |
| Jón Sigurd Gleðisheygg | 7/0 (1-0) | Givin | |
| Alfred Jacobsen | 4/0 (0-0) | Givin | |
| Oddvin Zachariassen | 4/2 (0-0) | AB | |
| Andreas Joensen Dahl | 4/0 (0-0) | Givin | |
| Jóhan Lützen | 3/0 (0-0) | Uttanlands | |
| Eyðstein Jacobsen | 1/0 (0-0) | Givin | |
| **Venjari** | | | |
| Piotr Krakowski (PÓL) | | | |





*– Tá ið eg kom til B36, var tað trongligt í álopinum, har serliga Jákup á Borg og John Petersen vóru boð upp á fremstu plássini. Tomislav Sivic var venjari. Hann setti meg í miðverjuna, og har havi eg verið síðani, sigur Egil á Bø, sum nú spælir fyri EB/Streym.*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Egil aftur á heimabeitinum

**Veteranurin í miðverjuni heldur stóran mun vera á fyrsta liðnum hjá EB/Streymi, sum royndi seg í 1. deild, og liðnum, sum hann nú er partur av**

JÓANNES HANSEN

Tá ið EB/Streymur í 1993 endaði næstfremst í 2. deild og í 1994 fyrstu ferð royndi seg í 1. deild, var Egil Zachariassen ein av stuðulsspælarunum. Hann var álopsspælari. Fyrsta royndin í 1. deild var bara hetta eina árið. Eftir niðurflytingina fór Egil úr EB/-Streymi. Í 1995 flutti hann niður við NSÍ. 1996-1998 var Egil á ÍF-liðnum, sum var í 1. deild, og tey síðstu fýra árini hevur hann verið í B36.

Nú er Egil aftur í EB/Streymi. Sammett við fyri níggju árum síðani er hann ikki álopsspælari men verjuspælari, og hann eitur ikki Zachariassen men á Bø.

– Talan er um gamalt staðarnavn í Vík. Abbi mín varð nevndur Hans Pauli á Bø, sigur Egil, sum sjálvur er ættaður úr Streymnesi og býr í Havnini. Umframt Egil búgva fleiri aðrir EB/Streyma spælarar í høvuðsstaðnum: Magni á Lakjuni, Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen, Ingi Hansen og eisini venjarin Piotr Krakowski búgva í høvuðsstaðnum.

Í EB/Streymi venja teir fýra ferðir um vikuna. Piotr koyrir norður hvørja ferð, meðan hinir spælararnir bara koyra úr Havnini og til Eiðis tvær ferðir um vikuna. Teir venja eisini í Havnini eftir skrá, sum venjarin leggur til rættis. Hetta kann neyvan vera optimalt, men hetta tykist vera prísurin fyri at fáa góðar og royndar spælarar norður til Eiðis at spæla.

### Heilt øðrvísi lið

Tá ið vit spyrja Egil á Bø, hvussu hann sammetir liðið, sum hann nú er partur av, við tað liðið, sum við Páll Guðlaugsson sum venjara var í 1. deild í 1994, so heldur hann, at liðið, sum teir hava í dag, er nógv betri:

– Fyri tíggju árum síðani høvdu vit fleiri evnaríkar spælarar. Men fyritreytirnar vóru ikki tær somu sum nú. Vit høvdu grúsvallir í Streymnesi og á Eiði, meðan hini feløgini vandu og spældu á graslíkisvallum. Nú hava vit ein góðan graslíkisvøll á Eiði, og umstøðurnar kring vøllin eru góðar. Tá vóru vit næstan allir rættuliga ungir. Stóra navnið hjá okkum var Bergur Magnussen, sum hevði spælt í B36, og sum tískil var royndasti spælarin. Men hann var nógv skaddur. Hinir spælararnir vóru allir rættuliga ungir, og eingin hevði royndir av at spæla í 1. deild.

Egil vísir á, at á liðnum, sum hann nú er partur av, eru nógvir spælarar við nógvum royndum, og at blandingin við ungum og evnaríkum spælarum er rættuliga góð.

– Vit hava staðið okkum væl í steypakappingini. Málið er at røkka betri endastøðu í landskappingini hesa ferð, enn 9. plássið, sum EB/Streymur endaði á í fjør. Eg haldi, at vit hava fólkið til tað. Sjálvandi hava vit onkrar lyklaspælarar, sum liðið illa kann vera fyri uttan. Men breiddin er væl størri nú, enn hon var fyri 9-10 árum síðani. Talan er um fleiri enn tjúgu spælarar, sum hava roynt seg í 1. deild, og vit hava fleiri spælarar, sum kunnu røkja somu uppgávuna, uttan at liðið viknar nakað serligt, um tað er ein ella hin, sum er á liðnum, sigur Egil á Bø.

### Verjuspælari skorar nógv mál

Egil var álopsspælari, tá ið hann síðst var í 1. deild saman við EB/-Streymi. Tá ið teir í 1993 spældu seg til uppflyting, var hann toppskjútti á liðnum við átta málum. Í 1994 fekk EB/Streymur átjan mál í 1. deild. Tá eru tey trý, sum teir fingu á Eiði í dystinum ímóti ÍF tald við. Seinni vann EB/Streymur øll stigini á skrivaraborðinum, og tá var málmunurin broyttur til 0-0. Tí eru málini hjá EB/Streymi í endaligu uppgerðini fyri hetta árið fimtan og ikki átjan.

Bergur Magnussen var toppskjútti við seks málum. Hinir málskjúttarnir vóru Ingi Hansen, Jákup W. Hansen, Conrad Joensen, Jákup Martin Joensen (2 mál), og Ólavur Høghamar, Jeffrei Joensen, Tummas Joensen og Finnbjørn Zachariassen. Umframt Egil eru Ingi og Jákup Martin á liðnum í ár.

Hóast hann fyri tað mesta var framrættaður miðvallari og álopsmaður, so eydnaðist tað ikki hjá Egili at fáa mál í 1994. Hann hevur altso framvegis til góða at skora mál fyri EB/Streym í 1. deild í landskappingini.

Men Egil hevur síðani hann fór úr EB/Streymi skorað 31 mál í 1. deild. 2 í 1995, 5 í 1996, 7 í 1997, 4 í 1998, 2 í 1999, 5 í 2000, 1 í 2001 og 5 í 2002.

*Hóast tú hevur skorað nógv mál, so hevur tú tey síðstu árini verið verjuspælari, og tað ert tú framvegis?*

– Tá ið eg kom til B36, var tað trongligt í álopinum, har serliga Jákup á Borg og John Petersen vóru boð upp á fremstu plássini. Tomislav Sivic var venjari. Hann setti meg í miðverjuna, og har havi eg verið síðani, sigur Egil á Bø, ið sum miðverji hevur skorað fimm mál í 2000, eitt í 2001 og fimm í fjør. Tey flestu av málunum hevur hann skorað eftir deyðbóltsstøður, tá ið hann hevur verið undir málinum hjá mótstøðuliðnum og víst evnini at vera á rætta staðnum røttu løtuna. Eitt av málunum í fjør var brotsspark.

*Kann tað hugsast, at tað verður í álopinum, at tú fert at gera um teg í ár?*

– Higartil hevur leikluturin verið tann sami, sum hann hevur verið í B36 tey seinastu árini. Eg havi spælt saman við Pazek. Piotr er venjari. Hann hevur verið venjari hjá mær í B36 tey seinastu árini, so hann veit, um og hvar eg kann brúkast. Og so skulu vit ikki gloyma, at vit í EB/Streymi hava góðar álopsspælarar. Sorin og Hans Pauli hava verið har frammi í ár, Magni og Ingi eru gamalir álopsspælarar, og onkrir av hinum ungu hava eisini dygdir sum álopsspælarar. So tað verður ivaleyst í verjuni, at eg fari at spæla. Men harvið er ikki sagt, at eg – eins og undanfarnu árini – fari framvið, tá ið talan verður um deyðbóltsstøður, og so mugu vit vóna, at tað fer at eydnast at skora í landskappingini fyri EB/Streym í 1. deild, sigur Egil á Bø.